## Timburmenn / Snikkarar

Søkt verður eftir timburmonnum ella snikkarum at byrja skjótast til ber.

Vit hava størri og smærri byggiuppgávur í gerð og fyri framman, so talan er um fjølbroyttar arbeiðsuppgávur. Til hetta hava vit brúk fyri handverkarum, snikkararum ella royndum fólki innan økið.

Tað er mennandi og hugaligt at arbeiða hjá Búsetur, tí vit hava væl skipað viðurskifti og arbeiða í toymum.

Vit liva av nøgdum viðskiftafólkum og ynskja tí, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin, álítandi og kannst arbeiða sjálvstøðugt.

Hevur hetta tín áhuga kannst tú ringja til Sjúrður Holm tlf. 210830 ella senda umsókn til Búsetur sp/f, Reynsgøta 14, 160 Argir."

BÚSETUR

Tel 310 830 | www.busetur.fo

BYGGIMEISTARI · TEL +298 210 830 · FAX +298 310 842


## Alt í einum

**Brother**

**DCP-115C**



**Print/Kopi/Skan**
Svart 20 síður/min
Lit 15 síður/min
Printar út til kantin
USB portur
Íroknað patrónir og dreivari

875,-

**DCP-340CW**



**Print/Kopi/Skan**
Svart 20 síður/min
Lit 15 síður/min
Netkort
USB portur
Íroknað patrónir og dreivari

1.975,-

**MFC-8440**



**Fax/Print/Kopi/Skan**
Svart 20 síður/min
Pappírsbakki til 250 ørk
USB og paralell portur
Íroknað tónari og dreivari

5.375,-

SpF Teldu Tænastan

Telefon: 317620 • Telefax: 317699 • Heimasíða: www.tt.fo


## PASS

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram í Danmark og er passavgreiðslutíðin umleið 2 til 3 vikur.**

**Vinarliga biðið tí um passið í góðari tíð.**

Umsókn um pass fæst á Fútaskrivstovuni, Smyrilsvegi 20, Tórshavn, á heimasíðuni www.politi.fo og á øllum politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Umsóknin kann latast inn við at venda sær persónliga til Fútaskrivstovuna í Tórshavn ella til eina av politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Skjøl at hava við, tá pass verður umbiðið:
- Gamla passið
- Dóps-, føði- ella navnaseðil og møguligt vígslubræv
- Nýggja passmynd stødd 35 x 45 mm.

Passið skal gjaldast, tá tað verður umbiðið.

| | |
|---|---|
| Persónar millum 18 og 67 ár | kr. 400,- |
| Persónar yngri enn 18 ár | kr. 115,- |
| Persónar, sum eru fyltir 67 ár | kr. 150,- |

Gjørt verður vart við, at eftir 1. oktober 2004 kunnu børn, sum eru undir 15 ár, ikki longur verða innskrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum, og skulu tí hava egið pass.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fútaskrivstovuna, tlf. 351448 ella politistøðirnar.

**Føroya Landfúti, tann 18. mai 2006**

Finn Ougaard
fg.

## Hárfríðkannar-felagið

Aðalfundur verður á Hotel Hafnia 6. juni, kl. 19.00.

Møti fjølment (ábit).

**Nevndin**

## Alternativ bygging á Norðoyri

Vísandi til kunngerð nr. 122 frá 22 des. 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, verður eitt øki á Norðoyri – omanfyri vegin, sunnanfyri bygdina – boðið út til bygging.

Boð saman við uppskoti um bygging verða at senda til:

**Klaksvíkar kommuna**
Postsmoga 2
FO-700 Klaksvík

í seinasta lagi 20. juni 2006.

Lendið, sum verður útboðið í fyrstu atløgu, er 6.200 m$^2$, íroknað vegir.

Seinni er ætlanin at bjóða enn eitt øki út uppá 7.500 m$^2$, íroknað vegir, til sama endamál.

Kommunan ger vegin, sum hoyrir til økið og skilar sær rætt til at selja økið til ein ella fleiri keyparar.

Minsti kostnaður fyri lendið er ásettur til kr. 240,- pr. m$^2$.

Ætlanin er, at á økinum skulu byggjast tví – ella raðhús í alternativum sniði, sum tó falla væl inn í lendið. Byggingin skal sjálvandi lúka ásetingarnar í verandi byggisamtykt fyri Klaksvíkar kommunu.

Eisini skulu atlit takast til verandi umhvørvi. Her verður serliga hugsað um verandi grótgarð sum ætlanin er at byggja uppaftur.

Við tilboðnum skal fylgja skitsuuppskot til bygging.

**Byggiætlanin skal fremjast við byggifreistum:**
- Byrja í seinasta lagið ½ ár eftir projektgóðkenning
- Ávegis byggifreistir fyri samanhangandi partar av projektinum
- Ásett freist fyri endaliga liðugtgerð

Verða freistirnar ikki hildnar, verður lendið at lata aftur til kommununa móti mettari samsýning.

Áðrenn møguligur sáttmáli verður undirskrivaður, skal fyriliggja váttan frá peningastovni um fígging.

Nærri kunning um byggiætlanina og útbjóðingartilfar kann fáast við at venda sær til Teknisku Umsiting – Hanus Poulsen ella Berg Viderø á tlf. 410000.

Mentamálaráðið
MENTAMÁLADEILDIN

## Rektari til Føroya Læraraskúla

Rektarastarvið á Føroya Læraraskúla er leyst at søkja.

Umsóknarfreistin er týsdagin 6. juni 2006, kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum "leys størv")

**Mentamálaráðið**

## Aðalfundur

**hjá Cøliakifelag Føroya** verður í MBF húsinum 27. mai kl. 10.00. Skrá sambært lógini.

**Nevndin**